# Somu rættindi og skyldur fyri øll

**Dagfinnur Danbjørg**
*1. mei røða 2002*

Góðu áhoyrarar. Góðu verkamenn og kvinnur!

Fyrst fari eg at takka Fuglafjarðar Arbeiðsmannafelag fyri, at teir hava víst mær tað álit og tann heiður at biðja meg um at halda røðu á altjóða arbeiðaradegnum í ár. Í fyrsta umfari helt eg, at betur hevði verið, um arbeiðarin var sín egni talsmaður, tí politisku talsmenn arbeiðaranna hava einki – og hava í longri tíð einki trúvirði havt. Men tá nevndin vildi hava tað á henda hátt, standi eg her og fari at gera mítt til, at 1. maidagurin – altjóða arbeiðaradagurin – eisini skal verða hildin her hjá okkum í Fuglafirði í ár.

Rithøvundurin, arbeiðarayrkjarin Carl Scharnberg sigur um áðurnevndu politisku og svikafullu talsmenn í yrkingini:

### Trúgv teimum ikki:

*Teir siga við teg:*
Um tú ikki kanst annað enn finnast at, so eigur tú at tiga
*Eg sigi:*
Trúgv teimum ikki.
Tí einhvør broyting byrjar, tá onkur varnast, at mál kunnu loysast øðrvísi, og tá tey tora at siga tað hart.

Tú skalt trúgva, at tú ert nakað.

Hesum eiga vit øll sjálvandi at taka fult undir við.

Ein annar arbeiðarayrkjari skrivar um »trælatokið«, ið flytir seg fram gjøgnum tíðirnar: Tá eg síggi fyri mær, hvussu óteljandi mill. hava livað upp gjøgnum søguna – sum slavir og trælir og lívegnir og marginaliseraðir og kúgaðir – ja, bara eg minnist vilkorini í mínum barnadøgum, so upplivi eisini eg, hvussu ættarlið eftir ættarlið hevur strítt seg til betri kor, eitt sindur størri frælsi, eitt sindur meira av tryggleika - við tógvi stríð og strev, tí tey á »niðastu« rók í samfelagspyramiduni fingu ongantíð nakað givið úr erva.

Á stovnandi aðalfundinum hjá 2. Internationala í París í 1889 avgjørdu luttakararnir, at 1. mai framyvir skuldi vera ein altjóða kravgongu- og festdagur, har arbeiðarar í øllum londum skulu stilla krøv um batar av teirra sosialu og fíggjarligu livikorum.

1. mai steðga arbeiðarar kring allan knøttin upp eina løtu og gera status, og ógvuliga ymist er frá landi til land, hvat status vísir.

Stríðið fyri rættvísiskrøvum arbeiðaranna hevur verið hart og er hart mangastaðni.

Menn, kvinnur og børn hava verið trælkaði, pínd og dripin, tá tey hava stríðst og stríðast fyri sjálvsøgdum rættindum. Ongi vápn hava verið ella eru ov skitin at brúka móti arbeiðarastættini, tá tey virði – arbeiðarastætturin hevur skapt – av kapitalistsins ørindasveinum verða rænd.

Í Onglandi vórðu fyrst børn og síðani kvinnur sendar til arbeiðis í kolanámunum, tí tey fingu minstu lønina. Nógv av børnunum náddu ikki fermingaraldrinum, fingu ensku sjúkuna, tí tey – fyriuttan lítla og onga føði – einki sólarljós fingu, tí tey fóru í og komu úr aftur kolanámunum í myrkri. Heimini vóru heilsuskaðilig, og læknahjálp var ikki at fáa. Kapitalistarnir ymsa staðni kring heimin nýta enn barnaarbeiði, trælkan og kúgan í eyðræning teirra, og teir skipa soleiðis fyri, at 40.000 børn doyggja í hungri hvønn dag. – Eisini 1. mai 2002.

Stættarmunurin var og er framvegis øgiligur, og hann økist dag um dag. Náðin er og var ongin. Mong av tykkum kenna ivaleyst søguna um fronsku drottningina, sum, tá hon frætti, at fólkið í París svøltaði, tí tey manglaði breyð, spurdi: »Hví eta tey ikki kaku?«

Hon og hennara á Versaillesslottinum – við teirra levnaði – kundu ikki vita betur enn, at man át kaku ella líknandi, um man var svangur, og um breyð ikki var fyri hondina.

Í dag – 1. mai 2002 – liva millum 1 og 2 mia. menniskju í Heiminum fyri minni enn 1 dollara um dagin, sjálvt um ríkidømið ongantíð hevur verið størri á okkara klótu. Um øll kríggj og útreiðslur til hermenn og til vápnaídnaðin vórðu steðgaði í bert tríggjar vikur, so høvdu øll fólk – fyri sparda peningin – kunnað fingið tak yvir høvdið, mat á borðið, læknahjálp og skúlagongd. Og hvussu mongum líðingum høvdu vit tá ikki kunnað sloppið undan?

Annars fari eg at biðja tykkum um, at líta tykkum íkring og kanna, um nakað virði er at síggja, sum arbeiðararnir ikki hava skapt. Nei, har finnast eingi. Men hvussu ber tað so til, at kapitalistarnir og teirra ørindasveinar eiga meginpartin? Kapitalistarnir siga, at pengarnir vaksa og yngla. Men hví vísa teir ikki okkum vakstrarstøðini og yngliplássini? Av tí simplu orsøk, at tað er lygn.



Tí uttan arbeiði og sveitta arbeiðaranna verða eingi virðir til.

Og teir, ið vilja lækka realløn tykkara, so teir sjálvir kunnu tilræna sær fleiri av arbeiðaranna virðum enn teir gera frammanundan, hvussu nógv forvinna teir, sum er? Mangir av hesum hava eina tímaløn, ið liggur væl omanfyri eina arbeiðara dagløn.

Sjálvt søguundirvísingin er falsað, so einstakir stórmenn standa sum teir, ið hava skapt virðini, og eina tílíka falsaða søguuppfatan er meiningin børn okkara skulu tilogna sær, so tey skulu føla og uppliva, at tey skulu standa við hattinum í hondini og liva av stórmanna náði, ístaðin, sum sannleikin er, at tað til allar tíðir hava verið teir stóru, ið hava stolið ágóðan frá tí arbeiðandi stættini.

### Bertold Brecht letur arbeiðara spyrja:

*Hvør bygdi Theben við teimum sjey grindunum?*
Í bókunum standa nøvn konganna.
*Hava kongarnir knossað helligrótið saman?*
Og tað fleiri ferðir oyðilagda Babylon.
*Hvør bygdi tað upp aftur tær mongu ferðirnar?*
Í hvørjum húsum í tí gullglitrandi
*Lima búðu bygningsarbeiðararnir?*
*Hvar fóru múrararnir tað kvøldið, tá tann kinverski múrurin var liðugur?*
Tann stóra Rómaborg er full av sigursboðum.
*Hvør bygdi teir?*
*Hvørjar sigrar gleddust Cæsararnir yvir?*
Tann ungi Alexandur hertók India.
*Hann einsamallur?*
Cæsar sló gallararnir.
*Hevði hann í minsta lagi ikki ein kok við sær?*
Hans Pauli í Hvannasundi fiskaði fyri eina milliard.
*Hann einsamallur? Hevði heldur ikki hann bara ein kok við sær?*
Á hvørjari síðu ein sigur.
*Hvør fyrireikaði sigursmáltíðirnar?*
Hvørt tíggjunda ár ein stórmaður.
*Hvør rindaði kostnaðin?*

So mangar søgur.
So mangir spurningar.

Í okkara tíð hevur m.a. stríðið í Kili, har hin fólkavaldið forsetin, sosialisturin og arbeiðaravinurin Salvador Allende varð myrdur við stuðli frá USA/CIA, víst okkum, hvussu vandamikið, tað kann verða, tá stríðst verður fyri arbeiðararættindum. Tað er ikki einans har, at altjóða kapitalurin hevur tikið til vápnaðan uppreistur, tá hann hevur følt seg gingnan ov nær. Eitt ótal av arbeiðarum – menn, kvinnur og teirra børn – vórðu pínd eftir øllum kunstsins reglum og fyribeind av bøðlum, sum sami altjóða kapitalurin hevði havt á skúlabonki fyri at læra raffinimentini. Mong av teimum, ið yvirlivdu tann organiseraða Devulskapin, havi síðani fingið bústað og sálarhjálp m.a. í hinum Norðurlondunum.

Í løtuni eru stórir partar av Europa á veg aftur ímóti facsismuni. Lond sum: Eysturríki, Italia, Portugal, Danmark, Norra, Belgia og nú eisini Frankaríki. spæla við eldin. Hesin eldur hevur fyri 60 – 80 árum síðani í Europa kosta 10-tals milliónum arbeiðarum og børnunum lívið og koyrt aðrar 10-tals milliónir í svárastu armóð. Eisini føroyingar guldu sín stóra part av høgravenda ørvitisknokkapolitikkinum, men tað sær svart út, tá vit skulu meta um, hvussu nógv søgan hevur lært okkum. Okkurt klókt høvd hevur gjørt spurningin: »Hvat er tað, tú keypir dýrt, letur gratis frá tær, men sum eingin vil hava?« Erfaringar. Rætt. Facisman verður endurtikin, um arbeiðarastætturin ikki organiserar seg og stáplar ta neyðugu mótmaktina á føtur aftur – eisini á hesum sinni.

Hjá okkum verður nú løgreglan sett inn við pistólum, lurkum og schæfarahundum meðan sjúkrabilar standa klárir at føra ofrini burtur, og ofrini eru føroyskir arbeiðarar í verkfalli fyri sámuligum lønar- og arbeiðskorum. Samstundis hóttir løgting og landsstýri við at fastseta arbeiðaranna kor við lóg, makka teir ikki rætt og ganga frívilliga undir arbeiðsgevaranna treytir. Hetta er í dag vorðið kor arbeiðaranna í Føroyum. Hvør skuldi trú tí???

Samstundis føra somu politikarar fram í fjølmiðlunum, at arbeiðararnir bert fáast at arbeiða, um lønin verður sett niður, meðan teir samstundis hevda, at kapitalurin og kapitalistarnir bert tíma at arbeiða um teirra skattur fer niður. Soleiðis er rákið anno 2002, – hevði tú trú tí???

Arbeiðarayrkjarin Jóannes Nielsen kallar hesar: Vinnulívsins Djengis Khan'ar og yrkir:

### Uttan tykkum vóru Føroyar støv.

Fiskavirkini niðurdottin
sum rotin neyst.
Hevði hagin grógvið yvir
traktorar og hoyggjhús.
Skipasmiðjurnar verið
tómir gapandi skálar.
Tað er spurningur um tað
hevði regnað.

Í tykkara stovum hanga
orginalarnir.
Eftir Mykines.
Av Reyni

Bundnir í leður standa
Svabo – Martin Joensen
– William Heinesen.
Sum hyllaprýði.
Sum idiotar.

Men tit viðurkenna Guð
og fyri hansara ásjón eru
vit øll sunnudagsskúlabørn.
Fegnir drógu tit hann upp
í tykkara nevndir og hvør
veit kanska sendir hann
eina umsókn.

At síggja tykkum góð –
endamálskvøldini brosandi
um eydnuhjólið í
bátsmannatroyggjum og
proletariskum topphúgvum.
Slík kvøld eru vit øll føroyingar.
Friður valdar
millum stættirnar. Ongin
snýtir í skatti.

Yvirskotið er skúgvað til
viks.
Samvitskan spraklar, eina
krónu seðilin slær nøkur
flikk flakk – øll klappa.

Tit elska lógina
serliga undirfullu holini
verða røkt sum eiggiligar
fryllur.
Tá tit krúpa uppá ringla
eistrini sum pengapungar.

Men soleiðis eru tit.
Snildir.
Gerst neyðugt
óreinir.
Og summir eisini skítbýttir.

Men uttan tykkum
var ongin at lovprísa í
skaldskapi.
Moralurin tveittur fyri
bakka sum ein tóm
altarvínsfløska.
Og grómutu framtíðarskýggini,
ið hanga sum síðir fruntar
fyri tykkara eygum
høvdu horvið sum roykur
frá sløktum ljósi.

Uttan tykkum
vóru vit rætt og slætt
leverað.
Høvdu verið sum eitt
sirkus uttan klovnir
ein matvørubúð uttan
pengakassa.
Stutt sagt: Eitt samfelag
bara droymarar og
útlendingar teska um í
loyndum.

Tað er tí alneyðugt, at tit sjálvir taka tey neyðugu stigini fyri at fasthalda vunnin rættindi og fyri at náa málinum: Somu rættindi og somu skyldir fyri tað fólk her býr.

Lat okkum – áðrenn vit enda – senda eina solidariska brøðra- og systrakvøðu til alheims arbeiðarafjøldina og lova teimum mongu, at vit eru við í teirra stríði, eins og tey eru við í okkara. Ósjónlig solidarisk bond eru knýtt okkara millum í okkara rættvísisstríði fyri somu rættindum og somu skyldum óansæð kyn, trúgv ella húðalit. Lat okkum tí standa saman við alheimsarbeiðarastættini og so til allarseinast taka undir við Scharnberg, tá hann í yrkingini:

### Víðari - skrivar:

Vit, ið eitt lítið bil
lógu niðri:
Latið okkum reisa okkum.

Vit, ið eitt lítið bil
vóru lamin:
Latið okkum fara til gongu.

Vit, ið bert eru ein dropi í
havinum.
Latið okkum verða til
reiðar
at blíva tann dropin,
ið fær bikarið at flóta
yvir.

Tøkk fyri, at tit í tolni lýddu á.



# Savnað og sterk verkamannafjøld eigur at seta viðkomandi og neyðug krøv

**Johan Carl Dam**
*1. mei røða 2002*

Hetta er fyrsti 1. mai og í ein lítlan mansaldur, fyrstu ferð at okkara fyrrverandi formaður, Karl Johansen, sáli, ikki er staddur á Vaglinum arbeiðaradagin.

Karl fór so brádliga frá okkum, og við honum tagnaði ein av røddunum, sum hava talað sak arbeiðaranna. Vit eru mong, sum minnast Karl Johansen við virðing og fyri tað, hann hevur gjørt fyri verkamannin sum heild.

Hóast skiparin mynstraði av, so heldur skútan fram sína leið.

Og Havnar Arbeiðsmannafelag skal eisini í framtíðini stríðast fyri og verja sak arbeiðaranna í høvuðsstaðnum.

Samráðingar verða ikki um høvuðssáttmálan í ár, kortini eru vit í samráðingum um t.d. onkran sersáttmála, men eiga vit beinan vegin at fara undir at fyrireika okkum til tað, sum skal fara fram um eitt ár.

Vit eiga at tryggja okkum, at tað eru tørvir og ynskir hjá limunum, sum verða borin fram. Vit eiga at raðfesta arbeiðslag og samstarv ovarlaga, og eiga tí at rætta hinum arbeiðarafeløgunum eina hond og virka fyri samstarvi heldur enn spjaðing og sundurlyndi.

Verkafjøldin má og skal standa saman í hesum døgum. Hetta hevur ongatíð verið meira neyðugt. Vit hava tørv á einari samlaðari og mergjaðari verkamannafjøld, sum skal taka við ábyrgd, men sum sanniliga eisini skal hava ávirkan.

Vit bera okkara stóra part av samfelagsbyrðuni, og eiga vit tí eisini okkara sjálvsagda rætt til ágóðar og rættindi, sum samfelagið bjóðar. Vit hava ikki tørv á spjaddari verkamannafjøld, sum partvís er bundin av partapolitiskum fjepparíi.

### Góðu fundarfólk!

Vit standa uttan fyri nýumvælda Tinghúsið, sum skal hýsa nývalda tinginum. Ein av uppgávum okkara er at syrgja fyri, at feita valfleskið hvørki tráðnar ella bráðnar. Vit skulu halda vakið eyga við landsins kosnu, vit skulu vera teirra ringa samvitska.

Vit skulu ikki krevja av løgtinginum at lóggeva okkum øll rættindi, vit skulu krevja, at løgtingið tryggjar okkum vunnin rættindi.

Hetta, tá tað snýr seg um lønarhækkan, um eftirlønarviðurskifti.

Hetta tá tað snýr seg um øll rættindi og ágóðar, sum liggja óvard, útholað og niðurbrotin av kapitalistunum og handlangarum teirra.

Hetta kunnu arbeiðarafeløgini ikki lata sær lynda. Vit kunnu ikki standa hendur í favn, meðan okkara fólk verður afturútsilgt og niðurpínt.

Verkamenn og -kvinnur, nú er stundin komin at rakna við.

Vit liva í einum samfelag við alsamt vaksandi stættarmuni.

Vit mugu vekja politikararnar og fáa teir at skilja, hvørja vandaleið hetta samfelagið gongur. Og fáa vit teir ikki at vakna á vanligan hátt, fara vit inn eftir teimum og draga teir út í okkara dagligdag. Har skulu vit vísa teimum, hvussu lívsins eiðrindarleysu kreftir virka og hóreiggja sær.

Hvussu ofta hava vit ikki ásannað seinastu árini, at lønarhækkanir ikki eru lønarhækkanir allíkavæl? At tær eru uppetnar longu áðrenn sáttmálin er undirskrivaður. Hetta tí handilsmenn og aðrir gribbar hava kannað sær vøksturin orsakað av neyvt útroknaðum príshækkingum.

Ein av fáu møguleikunum hjá verkafólki at fáa meiri í løn er yvirtíðin. Men hvat nyttar tað okkum at arbeiða yvir, tá lønin fyri hetta verður so hart skattað, at tað als ikki loysir seg.

Nei, her má vend koma í. Løgtingið skal sum skjótast syrgja fyri einari rættvísari og miðvísari prísansan. Løgtingið skal sum skjótast syrgja fyri, at skattastigin lagar seg soleiðis, at inntøkan hjá verkamanninum ikki verður brandskattað. Hetta eru fyritreytir fyri, at tað skal kunna bera til hjá verkafólki, hetta er fyritreytin fyri at tey kunnu hóra undan.

Løgtingið skal eisini beinanvegin fáa skil á eftirlønarøkið soleiðis, at tað kann bera til hjá verkamannafeløgunum at seta í verk ta eftirlønarskipan, tey sjálvi ynskja sær.

Hetta hevði m.a. havt við sær, at rættiligt lív aftur fekst í eftirlønar-grunnin hjá Havnar Arbeiðsmannafelag, sum fekk skot fyri bógvin, tá tryggingarlógin bleiv broytt herfyri.

Tað fer at vera okkara evsta krav til landsins myndugleikar, at verkamannafeløgini verða tikin upp á ráð, tá eftirlønarskipan skal tilevnast.

Vit fara ikki at góðtaka, at almennir fultrúar og stjórar snikka eina eftirlønarskipan til – saman við bankum og tryggingarfeløgum.

Tað sigur seg sjálvt, at ein lágløntur kann ikki ganga undir somu eftirlønartreytir sum tey, ið tjena millum hálva og heila millión árliga.

Tá tað um eftirløn ræður, eiga vit í álvara at fara undir at arbeiða fyri, at tað skal bera til hjá verkafólki at fara úr arbeiði við virðiligari eftirløn, hóast ein ikki hevur rokkið tey 67.

Hetta ber til hjá so nógvum øðrum bólkum, og eigur tað tí eisini at bera til hjá teimum, sum kanska verða mest og fyrst niðurslitin. Verkamaðurin skal ikki verða forðaður at fara av arbeiðsmarknaðinum, áðrenn hann verður blakaður út. Hvørki av Almannastovuni ella øðrum.

Hann skal hava sín sjálvsagda rætt at fáa virðiliga eftirløn frá tí degi, hann fer til hús.

Eitt verkamannafelag er felag limanna – ikki bara 1. mei, men í tí dagliga. Tað snýr seg tí eisini um, at limirnir fáa innlit í virksemið, at teir verða kunnaðir um tilboð av ymsum slagi, at teir verða kunnaðir um tað, sum fer fram á økinum.

Sjálvur ætli eg mær at virka fyri, at Havnar Arbeiðsmannafelag verður eitt opið og virkið felag, sum skal upplýsa um og menna øll viðurskifti limanna. Bæði til arbeiðis og heima.

Kæru fundarfólk! Samráðingar um høvuðssáttmálan verða sum sagt ikki fyrr enn 2003. Tó liggja nógvar og drúgvar fyrireikingar fyri framman.

Komandi samráðingar fara sjálvsagt at snúgva seg um lønarhækkan, men ikki bara um tað. Eg skal ikki her nevna øll tey mál, sum protokollatið fer at fevna um, men eg kann vissa tykkum um, at nógv týðandi stórmál koma á skrá.

Eg kann eisini vissa tykkum um, at vit fara ikki at bakka frá rættvísiskrøvum. Hetta krevur, at vit fyrireika okkum væl og í góðari tíð. Tað skylda vit ikki bert limum okkara, tað skylda vit mótpartinum, tað skylda vit øllum samfelagnum.

Tað skal vera mín vón, at ein savnað og sterk verkamannafjøld fer at seta viðkomandi og neyðug krøv, og at hon fer at hava styrkina til at fáa hesi krøv ígjøgnum. Tað er mín sannføring, at ein sterk og savnað verkamannafjøld ikki bara tryggjar eitt samhaldsfast samfelag, hon tryggjar eitt sterkt og rættvísari samfelag.

Takk fyri at tit lýddu á.



*Jóhan Carl Dam var millum røðararnar á 1. mei haldinum í Havn*